FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

# Grundskeið í lóg á Fróðskaparsetri Føroya

Í vár verður væl umtókta Grundskeiðið í lóg aftur á Søgu- og samfelagsdeildini á Fróðskaparsetri Føroya.

Grundskeið í lóg er partur av samfelagsútbúgvingini á Fróðskaparsetrinum.

Skeiðið er eisini ætlað fólki, ið ikki eru lógkøn (ikki hava cand. jur. ella líknandi útbúgving) og vilja menna kunnleika sín til løgfrøðiligt háttalag og fáa betri fatan av lógum og juridiskum teksti.

Undirvíst verður tvær ferðir tríggjar tímar aðru hvørja viku, mánadag og mikudag, kl. 10.00 – 13.00.

Skeiðið byrjar mánadagin 9. februar 2009 og endar við eini 4-tímars skrivligari próvtøku mikudagin 27. mai 2009.

Dentur verður lagdur á praktiska almenna fatan av lógkunnleika, serliga at finna og tulka lóg, men í serliga partinum verður hugt nærri at evnum innan stjórnarlóg og fyrisiting.

Fróðskaparsetrið hevur í nøkur ár boðið skeiðið út, og tilsamans sjey flokkar hava lokið prógv. Sera stórur áhugi hevur verið fyri skeiðnum.

Ábyrgd av skeiðnum hevur Kári á Rógvi LL.M., lektari í løgfrøði.

Fyri uttansetursfólk (tey, ið ikki lesa á Fróðskaparsetrinum) verður skeiðsgjald kravt, kr. 8.000 fyri skeiðið, íroknað skeiðstilfar og próvtøkugjald.

Umsókarblað fæst við at venda sær til Søgu- og samfelagsdeildina, J. Broncksgøta 25, 4.h., tlf. 352580. Víst verður eisini til heimasíðuna: www.setur.fo

**Umsóknarfreistin er sett til mánadagin 26. januar 2009.**

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
Setursskrivstovan · tlf. 35 25 00 · J. C. Svabos gøta 14
Postrúm 272 · 110 Tórshavn · www.setur.fo

VESTMANNA KOMMUNA
Bakkavegur 16 | Postboks 91 | 350 Vestmanna

# NÁMSFRØÐINGUR TIL LÁTIPÍPUNA

Søkt verður eftir námsfrøðingum til Látipípuna, einum til Útibarnagarðin og einum til Frítíðarstovuna, at byrja 1. mars ella eftir nærri avtalu.

Arbeiðstíðin er 30 tímar um vikuna, men talan kann vera um fleiri tímar.

Um eingin námsfrøðingurin søkir, verður hjálparfólk sett í tíðaravmarkað starv.

**Vit vænta, at:**
- tær dámar at vera úti saman við børnum, og at tú dugir at síggja styrkirnar hjá hvørjum einstakum barni
- tú kanst arbeiða sjálvstøðugt
- tú hevur góð samstarvsevnir
- tú ert opin og erlig/-ur í samskiftinum við onnur

**Vit kunnu bjóða:**
- ein grønan stovn í náttúruumhvørvi við góðum møguleikum fyri túrum í á, haga og fjøru
- ein stovn, har dentur verður lagdur á alla tíðina at menna arbeiðið við børnunum
- ein starvsfólkabólk, sum er opin fyri nýggjum avbjóðingum

**Lønar- og setanarviðurskifti**
Lønar- og setanarviðurskifti eru sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag, Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Núverandi setanarstaður er Látipípan. Setanarøkið er dagstovnaøkið í Vestmanna Kommunu.

Nærri fæst at vita um størvini við at ringja til Annu Dalsgaard, leiðara, á tlf. 230 145.

Skrivlig umsókn við avritum av prógvum og viðmælum skal vera Vestmanna Kommunu í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 23. januar 2009 kl. 12.

**Látipípan** er ein stovnur við útbarnagarði til 5-7 ára gomul børn og frítíðarstovu til børn í 1.-2. flokki.

Frítíðarstovan er inni á Fjørð – tætt við Fossá, fjøruna og sandin.

Dentur verður lagdur á at geva børnunum fjølbroyttar upplivingar saman við javnaldrum, og at læra tey at virða hvønn annan.

Útibarnagarðurin er í Miðalsbrekku í vøkrum náttúruumhvørvi millum Hórðará og Gjógvará – tætt við hagan.

Dentur verður lagdur á at geva børnunum upplivingar úti í náttúruni, og at búgva tey til at fara í skúla.

umhvørvisstovan
ENVIRONMENTAL AGENCY

# FRÁBOÐAN UM UMHVØRVISGÓÐKENNING

Við hesum verður gjørt kunnugt, at Umhvørvisstovan tann 7. januar 2009, við heimild í grein 26 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd og kunngerð nr. 54 frá 3. mai 1994 grein 1, nr. 4 og 4a, seinni broytt í grein 5, nr. 1 og 4 í kunngerð nr. 90 frá 28. september 2007, hevur góðkent:

**Virkið hjá P/F Seanergy á Eiði**

Góðkenningin liggur alment frammi á Umhvørvisstovuni. Avgerðin kann kærast til landsstýriskvinnuna við umhvørvismálum. Møgulig kæra skal sendast Umhvørvisstovuni, Traðagøta 38, FO-165 Argir, í seinasta lagi fýra vikur frá dags dato.

Góðkenningin kann somuleiðis síggjast á heimasíðuni hjá Umhvørvisstovuni, www.us.fo.

**Umhvørvisstovan**
Boks 2048 · Tlf. 342400
FO-165 Argir · us@us.fo
www.us.fo

# KOYRIKORT?
EYSTUROYINGAR

**Nýtt teoriskeið byrjar mikudagin 14. januar 2008 kl. 18:00.**



**Tilmelding hjá:**

| | |
|---|---|
| Jari Lykke | 590500 |
| Mikkjal Hansen | 722578 |
| Hugo Kristiansen | 225225 |
| Andrea Isaksen | 211687 |

**EYSTUROYAR TEORISKÚLI**

# Skattalistin fyri 2007

liggur frammi til alment eftirlit á kommunuskrivstovuni við Gøtugjógv
frá 9. januar 2009 til 23. januar 2009
báðir dagar íroknaðir.

Götu Kommuna
við Gjónna 2 · Postrúm 40 · FO- 510 Gøta
Tel 471000 · Faks 471001 · gota@gota.fo

# Umboðsmannaval

Sambært grein 28 í høvuðssamtyktini verður lýst til umboðsmannaval í Fuglafirði 11. februar 2009.

4 umboð skulu veljast.

Uppskot um – minst 6 valevni – skulu vera sjúkrakassanum í hendi innan 25. jan. 2009.

**Sjúkrakassi Fuglafjarðar Læknadømis**

# SKATTALISTIN FYRI 2008

Skattalistin fyri Vestmanna Kommunu liggur frammi til alment eftirlit á kommunuskrivstovuni frá 9. januar – 23. januar 2009.

Skrivstovan er opin:
mánadag til fríggjadag kl. 9.00 – 15.00

**Vestmanna Kommuna**